**Húsavarðartænastan**

Jens Kristian Hansen
Bygningssnikkari
Tel. 215590

Sámal Erik Hentze
Bygningssnikkari
Tel. 215589
Fax. 315590

**Ogna tær tín egna húsavørð**

# Handverkarar til Húsavarðartænastuna

Søkt verður eftir tveimum dugnaligum handverkarum til Húsavarðartænastuna, at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:**
- Húsavarðartænastu uppgávur
- Húsaumvælingar bæði stórar og smáar
- Nýbyggjan/umbyggjan – av ymiskum slag
- Umframt aðrar líknandi uppgávur

**Krøv til tann, ið settur verður:**
- Tú er lærdur bygningssnikkari ella timburmaður
- Hevur koyrikort
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi og ágrýtin
- Góð samstarvsevnir

**Húsavarðartænastan kann bjoða tær:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv
- Samstarv við nógvar ymiskar kundar
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur

Løn og onnur viðurskifti tosa vit nærri um.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi sum skjótast.

Vilt tú vita meira um starvið, so ring og spyr eftir Húsavarðartænastuni.

**Alt snikkara- og timburarbeiði**

# Pedagogur
## til Sambýlið á Líknagøtu

Innan Heimarøktina og Serforsorgina, og stovnum undir tí við fyribilstænastu á Sambýlinum á Líknagøtu 1 í Saltangará, er eitt pedagog starv leyst til setan 1. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt tænastumannastarv. Løn- og setunartreytir verða eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønarstigini 24-33 eftir lønartalvu frá 01.10.04.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, tvs. tað eru dag, kvøld og náttarvaktir. Eisini verður arbeitt í vikuskiftum og á serstøkum halgidøgum

Á Sambýlinum á Líknagøtu búgva 3. ungir menn við autismu. Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum og verandi starvsfólkum. Tað krevur m.a., at tú er førur fyri at gera kropsligt arbeiði, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.s.fr.

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi 3 & 6 í Runavík, ið eru undir somu leiðslu sum Sambýlið á Líknagøtu 1. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Bert umsøkjara, sum hava lokið eina námsfrøðiliga útbúgving verða settir í starv.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121 ella á tlf. 211478. Umsóknarfreistin er mánadagin tann 14. februar 2005 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Bústovnurin á Rúnarvegi**
**ATT.: Leiðarin**
**Rúnarvegur 6**
**FO-620 Runavík**

# Kunngerð

Vísandi til, at fólkatingsval er útskrivað, og fer hetta fram:

**týsdagin tann 8. februar 2005**
**á kommunuskrivstovuni**

Atkvøðutíðin er frá kl. 09.00 - 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøða:**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2005 greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2005 við at boða kommunuskrivstovuni frá, ella valnevndini á tlf. 361189.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar, kl. 09.00. týsdagin 8. februar 2005.

**Valkort:**
Valkort verða send við postinum og um persónur, sum heldur seg hava valrætt ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

*Skopun, tann 03. februar 2005*

**Skopunar Kommuna**

# VOLVO
## STATIONCAR
***til sølu***

Árg. juni 1999
km. 90.500
útgerð auto gear
í sera góðum standi

**Tel. 44 82 05 ella 21 94 79**



# Bátur til sølu

37 fót glastrevjabáturin, Hvítaberg, til sølu við fiskiloyvi 5A, um hóskandi boð fæst. Báturin er í sera góðum standi. Motorurin er ein uml. 3 ára gamal, vælhildin Ford. Báturin hevur nógva útgerð: 7 automatiskar snellur, línu og nógv annað.

**Nærri fæst at vita við at ringja**
**tlf. 315813 ella 215813**

# Pedagogur
## til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 15. mars 2005.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs leiðara tlf.225222 / 444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. februar 2005 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður 03. februar 2005*

**Fuglafjarðar býráð**

Lesið Sosialin - so eru tit við